## Nýggj føroysk startsíða

**Alnetið:** Ein nýggj síða við nógvum møguleikum er komin á alnetið. Síðan www.start.fo (myndin) ið er gjørd til allar aldursbólkar, er nú stovnað av Bárðuri Bærentsen. Hann helt at tað manglaði ein byrjunarsíða til sítt egna barn, og stovnaði tí hesa síðuna við leinkjum til tryggar barnasíður á alnetinum. Ein annar møguleiki á heimasíðuni er tónleikurin. Her kanst ein velja ein bólk, t.d. AC/DC, og so kemur ein avspælari upp við einu rúgvu av AC/DC videoløgum frá YouTube, og sum so spælir non-stop. start.fo hevur somuleiðis seks ymiskar videoavspælarar við ymiskum evnum.




## Til gongu í summar

**Eysturoy:** Aftur í ár ferð Eysturoyar Gongufelag at skipa fyri túrum kring oyggjarnar. Fyrsti túrurin verður longu í hesum mánaðinum og tann seinasti í september mánaði, teir flestu við staðkendum ferðaleiðara. Vitjað verður bæði í Eysturoy, Kunoy. Borðoy, Streymoy, Vágum, Sandoy og í Suðuroy, eins og ætlanin er at fara ein ferð til Íslands í summar. Túrarnir eru skipaði í trý ymisk torleikastig, alt eftir hvagar farið verður. Fyrsti túrurin verður ein spákingartúrur til Hvalvíkar og við Áir, har Ásbjørn Dahl fer at greiða frá um hvalastøðina.

# í kioskina




*- Plássið er avmarkað, men eg haldi kortini, at vøruúrvalið er sera gott, sigur Maud Østerø, sum rekur norðastu kioskina á Kalsoynni*

eitt stað, at kunna keypa sær okkurt, tá tey komu norður higar.

- Eg tugdi uppá tað leingi, og tja, so hevði eg bara hug at royna tað, greiðir Maud Østerø frá.

Kioskin lat upp á sumri í fjør, men hetta var kortini so mikið seint, at hon ikki fekk veruliga fatur á øllum summargestunum í oynni – tá, væl at merkja!

Í summar verður væntandi øðrvísi, nú fólk so líðandi eru vorðin kunnug við nýggju kioskina.

### Skelti og klokka

Hóast fólkatalið í Kalsoynni er avmarkað – tey eru bert 125 í tali – gongur ikki dagur, at ikki onkur er og keypir í lítlu kioskini.

- Her er talan bæði um fólk úr oynni, men eisini aðrastaðni frá.

- Ja, eg haldi bara at fólk eru fegin um henda møguleikan at kunna keypa sær okkurt etandi og drekkandi her hjá okkum, sigur kioskeigarin á Trøllanesi.

Tað serstaka við kioskini er, at hon er opin ávísar tíðir, men at fólk ikki er í kioskini allatíðina.

Støðan er nevniliga hon, at Maud eisini er bóndakona. Og tá hon býr í grannahúsinum er skjótt og lætt at leypa yvir í kioskina, um onkur ætlar at keypa sær eitthvørt.

- Har er bæði eitt skelti sum sigur frá tí, og so ein klokka sum fólk kunnu brúka. Eg eri so altíð til taks, sigur hon.

### Avmarkað pláss

Kioskin á Trøllanesi telist ikki millum tær stóru í landinum. Men úrvalinum av vørum bilar kortini einki.

- Eg selji allar tær vanligu vørurnar, sum ein eigur at fáa í eini kiosk. Onkur spurdi um eg ikki kundi selja keks, so tað geri eg eisini.

- Men sjálvandi, eg kann jú ikki selja alt, tí plássið er so avmarkað, slær hon fast.

### – Jolly er gott móti spýggjusjúku

Hóast fólkatalið á Kalsoynni er avmarkað, er líkt til at fólk hava tikið væl undir við tiltakinum hjá Maud Østerø. Henda dagin, ið umboð fyri Sosialin vitjaðu kioskina, var Jona í Lon farin av Húsum og til handils á Trøllanesi saman við familju síni. - Vit komu higar fyri at keypa sodavatn og annað til børnini. Tey liggja við spýggjusjúku í dag og í slíkum føri er jolly gott fyri búkin, sigur hon. Tey høvdu fyrst verið í handlinum á Húsum, men har vóru væl umtóktu sodavatnirnar útseldar. Tí valdu tey at koyra norður higar. - Eg haldi at tað er skeg, at ein kann fara og keypa í eini kiosk á Trøllanesi, sigur Jona í Lon.

> *Har er bæði eitt skelti sum sigur frá tí, og so ein klokka. sum fólk kunnu brúka. Eg eri so altíð til taks*
> (Maud Østerø, Trøllanes)

> *Vit komu higar fyri at keypa sodavatn og annað til børnini. Tey liggja við spýggjusjúku í dag. og í slíkum føri er jolly gott fyri búkin*
> (Jona í Lon, Húsar)

> *Men sjálvandi, eg kann jú ikki selja alt, tí plássið er so avmarkað*
> (Maud Østerø, Trøllanes)